# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar

1. apríl fingu Miriam Hinz og Niels Juel Arge, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3050 gr.

2. apríl fingu Eyðfinn Hansen og Guðný Wardum, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3550 gr.

2. apríl fingu Edith Vang og Sámal Petersen, Kaldbak, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4400 gr.

3. apríl fingu Alice og Jónhard Frederiksberg, Undir Gøtueiði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4170 gr.

3. apríl fingu Marjun og Jógvan Pauli Joensen, Miðvági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3950 gr.

3. apríl fingu Joan Laursen og Regin Olsen, Sandavági, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4250 gr.

4. apríl fingu Hanna Haraldsen og Áki Johansen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

4. apríl fingu Eva og Ragnar Nesstein, Skipanesi, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3750 gr.

5. apríl fingu Annette Sørensen og Hans Jákup Ellingsgaard, Saltangará, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3700 gr.

5. apríl fingu Katrin Thomsen og Olav Andreasen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3700 gr.

6. apríl fingu Ann og Regin Petersen, Saltnesi, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3350 gr.

## Minningarorð um
# Jákup Andreas Høgnesen



Óvæntað og sera dáttliga kom tað við, tá Fanny sunnumorgunin 7. mars ringdi og segði, at Dia bróðir var farin. Eg hevði verið inni á gólvinum kvøldið fyri, og vit høvdu sum so mangan fingið okkum eitt gott prát um lívsins viðurskifti. Stutt fyri leggingartíð fór eg yvir aftur til mín sjálvs, men tá vardi tað meg ikki, at hetta skuldi verða seinasta samrøðan okkara millum her á fold.

Jákup Andreas Høgnesen, Dia sum hann vanliga varð kallaður, varð føddur á Norðoyri 28. februar 1927, sonur Kristionnu, ættað úr Mittúni á Kirkju og Jóan Karl, bónda í Niðristovu á Norðoyri. Dia var sostatt 77 ár, nú hann legði árarnar inn.

Dia giftist í 1953 við Fanny Eidesgaard av Eiði. Tey fingu 4 børn: Jørgin Olaf, sum býr í Skúvoy, Kristionnu, ið býr í Klaksvík, Jón, ið býr á Viðareiði og Eyðbjørn, ið býr í Danmark. Fanny og Dia eiga 12 ommu- og abbabørn. Dia var góður familjumaður, pápi og abbi, hevði stóra umsorgan fyri sínum og hjálpti og stuðlaði børnum og abbabørnum alt tað, hann kundi. Dia var hegnigur og dugdi væl at smíða, og tað er ein fragd at síggja, hvussu væl røkt heimið hjá Fanny og Dia er.

Vit vóru 9 systkin í Niðristovu á Oyri. Elst var Karin, ið var fødd 1915, síðani kom Lena í 1916, men hon doyði av meslingum nakrar mánaðir gomul. Í 1917 kom aftur ein Lena, í 1919 Sámal, 1922 Christian, 1924 Frida, 1927 Dia, 1929 Karl og í 1932 Elisabeth. Av hesum stóra systkinaflokki eru vit nú fýra eftir á lívi: Frida, Karl, Elisabeth og eg sjálvur. Fýra av systkjunum eru farin síðstu 3 árini, fyrst Sámal, síðani Karin, Lena og nú Dia. Eg má siga, at tungt kennist tað, nú systkinaflokkurin tynnist so skjótt, men vit mugu bara ásanna, at soleiðis eru lívstreytirnar. Menniskjan verður borin í heim, mennist og stendur í blóma, fyri síðani at følna og fara foldum frá.

Vit systkini vuksu upp í 1920- og 30-árunum. Stórur partur av tríati árunum vóru ringar tíðir og lítið av peningi var millum fólk, men vit høvdu eitt gott heim og tryggar umstøður. Stóran týdning hevði tað fyri húsarhaldið, at pápi var bóndi og eisini átti væl av jørð. Jørðin og tað hon gav, var grundarsteinurin undir húsarhaldinum og so var eisini høgligt at fáa fisk. Men nógv arbeiði skuldi gerast fyri at føða og klæða ein so stóran barnaflokk. Farast skuldi eftir fiskinum og seyðurin skuldi takast við ullini, áðrenn maturin kom á borðið og plaggið á kroppin.

Vit børn vórðu vand upp til at taka lut í arbeiði, tá ið vit vóru so fræg. Minnist aftur á, hvussu pápi vandi okkum smádreingir at ganga skorarnar. Oftast tók hann okkum við sær tveir og tveir, og fyri hvørja ferð gingu vit longri enn frammanundan. Tá ið pápi helt, at nóg mikið var fyri smádreingirnar, bað hann okkum sita pinnastillar á rókini og bíða, til hann kom aftur eftir okkum. Nakrar hundrað metrar dygst niðurfyri var bláa havið, og vit smádreingir lærdu, at hetta var ikki spæl, men lívsins álvara.

Frá barnsbeini av lærdu vit eisini at vera í báti og at søkja sjógvin. Minnist, at mamma plagdi at biðja pápa taka okkum við, tí so visti hon, hvar vit vóru. Fjøllini og sjógvurin vóru nátúrligur partur av uppalingini, og gav hetta okkum bæði kunnleika, virðing og alsk til umhvørvi og føðiland.

Fáum man unnast at fylgjast so leingi og so tætt á lívsleiðini sum mær og Dia. Sum eldri bróðir havi eg fylgt honum úr vøggu í grøv hansara 77 ára langa lívsskeið. Vit vuksu upp sum brøður í stórum systkinaflokki, og í bestu manndómsárum høvdu vit útróðrarbátar saman við sváginum Jóan Paula, fyrst Sævarenni og so Brattenni. Fiskivinnan var okkara álit og fíggjarliga grundarlag undir húsi og heimi. Vónin og trúgvin drívur verkið, ikki minst hjá útróðrarmonnum, ið ongantíð vita, hvat teir fáa burturúr, fyrr enn túrurin er av. Og mangt er at minnast aftur á manndómsár okkara sum útróðrarmenn. Tað stóð ikki á at fáa gott fólk, raskar og skilagóðar útróðrarmenn. Vit høvdu mangar baldrutar túrar, og nógv var at taka støðu til, men tað er okkum í holdið borið, at vit minnast best tær góðu løturnar, og tær hevði eg mangar saman við Dia. Ein av teimum var ein útróðrartúrur, tá vit settu 20 stampar vestan fyri Mýling og fingu 84 kalvar, ið vigaðu 4830 pund.

Dia dámdi væl at fáast við fiskiskap, og sín seinasta lívsdag hevði hann eisini verið í egningarskúrinum og egnt einar 10 stampar, so sum hann plagdi. Dia var partur av útróðrarlívinum í Klaksvík til sín doyggjandi dag og sorgblítt var at síggja teir mongu bátarnar á Stongunum, sum við flagginum í hálvari stong fyri seinastu ferð heilsaðu Dia, tann dagin hann varð borin til gravar.

Umframt at vera brøður og lagsbrøður vóru eg og Dia eisini grannar og vinmenn og høvdu somu áhugamál. Nú í aldurdóminum høvdu vit mangar góðar útróðrartúrar av Borðoyarvík. Dia hevði gott skil á veðri og streymi og var góður at ráðføra seg við. Tungt verður at leggja út aftur av Víkini, nú Dia ikki eisini er innanborða og tómligt er í túninum, nú hann er farin, men minnini um hann eru góð.

Jákup Andreas var stillførur maður, og stillisliga fór hann hiðani frá. Dia er nú burtur úr likaminum og heima hjá Harranum, og likam hansara hvílir nú í okkara fedranna jørð millum Oyrar og Gerðar.

Fari við hesum orðum at lýsa frið yvir minnið um mín góða bróður, lagsbróður, granna og vinmann.

**Christian**

## Dagurin

**8. apríl. Janus**. Navnið er ókent í halgimannatali; sipar helst til ein Januaris í Suðuritaliu, sum varð tikin av døgum
*Vensceslaus Ulricus Hammersheimb doyði hendan dagin í 1909, og Kristian Osvald Viderø doyði hendan dagin í 1991.*

**9. apríl. Procopius**. Talan er kanska um tann Prokorus, sum er nevndur í Ápostlasøguni 6,5. Segðist vera bróðursonur Stefans.

**10. apríl. Ezekiel**. Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla testamenti.
Navnið merkir *Guð er sterkur.*

**11. apríl. Leo**, deyður í 461. Pávin Leo I, nevndur tann Mikli. Hann talaði Artala húnakong frá at hertaka og ræna Róm.
Navnið Leo merkir *leyva*.

**12. apríl. Julius**, deyður í 352. Til minnis um pávan Julius I. Rómverskt ættarnavn.

**13. apríl. Jústinus,** deyður umleið ár 165. Heiðin maður í Sámáriu; varð upplærdur í grikskari heimspeki og fekk navnið heimspekingurin. Gjørdist kristin og varð tí tikin av døgum í Róm.
Navnið merkir *hin rættvísi.*

**14. apríl. Summarmáli**. Eftir gamlari føroyskari tíðarrokning byrjar summarhálvárið hendan dag. Sagt var, at á summarmála avdagast ikki, tí var klárt í veðrinum, skuldi dagsglæman ikki hvørva. Soleiðis sum summarmáladagur er, soleiðis verður várið.
Dagurin eitur annras *Tiburtius*. Saman við bróður sínum varð hann tikin av døgum umleið 225.

## Silvurbrúdleyp

7. apríl hava hjúnini Nora og Sjúrður Christiansen, Skála, verið gift í 25 ár.
Dagurin verður hildin í Bygdarsalinum 17. apríl kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 441546 ella 223276 innan 14. apríl.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hans Thomsen
## 90 ár



Í dag verður Hans Thomsen, vanliga nevndur Hansmann 90 ár.

Hann er føddur í Porkeri og vaks upp í Skemmuni sum nr. 5 av einum barnaflokki ið taldi 11.

Hann er sonur Johan í Gloppinum úr Fámjun og Onnu Djurhuus úr Skemmuni.

At hava góðar hendur var ættarbregi, og eins og pápin dugdi hann væl at smíða.

16 ára gamal fór hann til Klaksvíkar og arbeiddi hjá Nordal.

Seinni fór hann til Danmarkar á handverkaraháskúla.

Afturkomin arbeiddi hann í Porkeri, til hann í apríl í 1945 byrjaði hjá Líggjasi Húsgarð sum landmátari.

Seinni fekk hann starv á Matrikulstovuni, og flutti øll familjan til Havnar í 1958. Hetta starv røkti hann, til hann var 72 ára gamal.

Í 1940 giftist hann Onnu Sofíu Tausen, ættað úr Hovi. Tey fingu 6 børn: Eivind, Anniku, Jórun, Niels, Ásgerð og Heðin.

Anna Sofía andaðist 1978 og Eivind í 2001.

Hans er enn birgur og møtir hvønn morgun í undirhúsinum.

Hann eigur 9 abbabørn og 22 langabbabørn.

## Hjørdis Johansen
## 75 ár



Triðja páskadag tann 13. apríl, fyllir Hjørdis Johansen í Sandavági 75 ár.

Hjørdis er ættað úr Sandavági. Hon er dóttir Mariu og Petur Heinesen á Lofti. Hjørdis er elst av seks systkjum, sum øll eru á lívi. Tey fimm systkin hennara eru Jóanes, Jens Pauli, Klæmint, Hildigunn og Ásvør. Hildigunn og Jens Pauli búgva í Havn. Hini búgva í Sandavági.

Hjørdis giftist við Alberg Johansen, sum eisini er úr Sandavági. Tey búgva í Giljum.

Alberg hevur verið sjómaður, og Hjørdis passaði hús og heim. Á yngri árum hevði hon eisini blómuhandil heima hjá sær sjálvum.

Hjørdis og Alberg eiga trý børn, Maluna, Torfinn og Petru. Malan býr í Sandavági, Torfinn og Petra búgva í Havn.

Ommubørnini eru 10 og langommubørnini fýra.

Føðingardagin heldur Hjørdis annan páskadag hjá dóttrini Maluni inni á Giljanesi.

## Jákup 60 ár



Skírisdag fyllir Jákup á Geilagarði í Leirvík seksti. Hann er næstelstur av átta systkjum, sonur John D. Joensen úr Leirvík og Solborg, dóttur Jákup á Geilini, Klaksvík, sum hann eisini er uppkallaður eftir.

Hann varð føddur 8. apríl 1944 í Klaksvík, men sleit sínar barnaskógvar í Leirvík. Byrjaði sjólívið sum fjúrtan ára gamal við Pállsdrangi, sum pápin saman við øðrum átti og førdi.

Aftaná royndi hann trolaralívið og byrjaði við Jóannes Patursson. Hann hevur eisini verið við øðrum kjølbrotrolarum. Seinni hevur hann eisini verið við norskum línubátum.

Tá hann hevði fingið nóg mikið av siglingstíð, fór hann til Klaksvíkar á skiparaskúla fyrst í sekstiárunum, og at fáa prógv var ongin trupulleiki. Evnini hava verið góð bæði so og so, og sjónáttúran framúr.

Sum fleiri við honum, hevur hann roynt flestallar veiðihættir á norðaru hálvu. Var eitt skifti yviri við Alaska við einum báti og lærdi teir at fiska við snellu.

Í 1971 keypt hann saman við tveimum brøðrum útróðrarbátin Sjófarið sunnan úr Vági og fór at rógva út og væl hevur ligið fyri at fingið fisk – við snellu undir Íslandi, við laksalínu norðan fyri Føroyar og við toskagørnum norðan- og vestanfyri. Teir høvdu Sjófarið í nítjan ár, sjálvur var Jákup við meginpartin av tíðini.

Seinni fór hann niður til Skagen á skiparaskúla har og tók eitt skeið fyri at kunna fara at sigla við farmaskipum.

Hann sigldi eina tíð sum stýrimaður og skipari. Tá hann gavst við tí, keypti hann sær ein glasfipurbát og hevur róð út síðani, burtursæð frá at hann í mai í fjør bleiv sjúkur og var undir læknahond árið út.

Men tíbetur sýnist tað sum hann er komin fyri seg aftur og er á Norðhavinum tá líkindi eru.

Jákup giftist í 1967 við Hannu Andreasen úr Rituvík. Hon hevur verið honum ein dyggur stuðul. Saman eiga tey tríggjar gentur og tveir dreingir.

Við hesum ynskja vit tær hjartaliga tillukku við degnum og Harrans signing og at tær unnast fleiri góð ár enn.

Kærar heilsanir

**J.**

## Andlát

2. apríl
Judith Jensen, fødd Djurhuus, ættað úr Vági, búsitandi á Amager, 86 ár.
Oda Petersen, fødd Magnussen, ættað av Eiði, búsitandi í Hundested í Danmark, 83 ár.

5. apríl
Solborg Joensen, Sandavágur, 85 ár.



## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, ið vóru við til at gera gullbrúdleypsdagin 30. januar á Svangaskarði so hugnaligan og ógloymandi fyri okkum.

Hjartans tøkk til tykkum mongu, ið sendu okkum blómur, gávur og fjarrit, og tykkum, ið ringdu til okkum.

Vit ynskja øllum eini gleðilig páskir

*Heilsan*
**Nelly og Piddi Olsen**
**Saltangará**

Tíðindaskriv frá Tora Tourist Traffic:

# Ein dagur – bert fyri vaskikonur!

**Tann 1. mai skipar Tora Tourist Traffic fyri serligum vaskikonudegi í Norðurlandahúsinum og vaskikonukvøldi á Hotel Föroyum**

Tora Tourist Traffic hevur tey seinnu árini skipað fyri fleiri ymsum tiltøkum, ið serliga eru ætlað kvinnunum her á landi. Tað veri seg grønar vikur, konudagur, bindiklubbadagur og annað, og felags fyri øll tiltøkini hevur verið, at undirtøkan hevur verið stak góð.

Aftur í ár verður eitt líknandi hugskot sett í verk, tá Tora Tourist Traffic tann 1. mai skipar fyri einum heilt serligum vaskikonudegi, sum endar við einum vaskikonukvøldi.

Hesin serligi dagurin byrjar spakuliga klokkan 9 um morgunin, tí tá er Norðurlandahúsið opið, so fólk kunnu hittast og fáa sær ein drekkamunn við onkrum afturvið. Sjálv skráin byrjar klokkan 10 við fyrilestrum og undirhaldi, og hildið verður fram til klokkan 14.

Tann 1. mai er jú arbeiðaradagur og tí er skráin løgd soleiðis til rættis, at allar vaskikonurnar eisini kunnu fara á felagsfundin, sum er á Vaglinum klokkan 15. Henda dagin hava eisini fleiri handlar í miðbýnum serlig tilboð til tær vaskikonur, sum er við til tiltakið.

Um kvøldið, klokkan 19, verður so vaskikonukvøldið á Hotel Föroyum við skemti og undirhaldi, umframt at góðir vinningar verða lutaðir burtur hvønn fullan tíma, so leingi tiltakið er.

Og so kunnu vit leggja aftrat, at sjálvandi kunnu menn eisini vera við.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum,
ið á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi,
tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma
okkara

**Karolina Láberg**

andaðist og varð jarðað.

Ein serstøk tøkk til tykkum á Skerðinum og á Áargarði,
ið vóru um hana hennara síðstu tíð.
Eisini ein serstøk tøkk til tykkum í meinigheitini.
Takk fyri blómur og kransar.
Og tøkk til tykkum, ið fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Ove, Tórbjørn, Sólrún og Jónleif v/ fam.**